DAGSINS MEINING

Er alternativið svart samband?

Tá sokallaða fíggjarlógin varð samtykt áðrenn jól, segði Torbjørn Jacobsen fíggjarnevndarlimur, at alternativið til semjuna um fíggjarlógina var "svart samband". Fyrst er at siga, at vit síggja, hvussu nógv semjan er verd. Longu nú fyrst í januar mánaði byrja samgongulimir at tosa um eykajáttanarlógir. Hetta tos fer ivaleyst at vinda upaftur meira uppá seg, tá asosiala ávirkanin av fíggjarlógini fyri 2003 fer at síggjast.

Umsitingina gjørdu teir einki við, hóast serliga tjóðveldismenn rópa upp um, at almenni sektorurin í Føroyum er alt ov stórur, tí at vit fáa blokkstuðul. Hetta er skeivt. Almenni sektorurin – og her hugsa vit um miðfyrisitingina – er alt ov stórur, tí at samgongan undir borgarligari leiðslu hevur latið umsitingina bólgnað upp, soleiðis at hon er tíggjutals milliónir dýrkað síðani 1998. Hetta hevur einki við blokkstuðulin at gera, men bert við manglandi føroyskari stýring.

Um vit nú venda aftur til orðini hjá Torbjørn Jacobsen um, hvat alternativið til sitandi samgongu er, so er at siga, at sitandi samgonga er ein heimastýrissamgonga, ið kanska enntá hoyrir til tær minni yvirtøkuhugaðu søguliga sæð.

Hendan samgongan fer ikki at yvirtaka løgregluna, tí tað stendur greitt í samgonguskjalinum, at hetta bert skal fyrireikast í hesum valskeiðnum. Fólkakirkjan, ið skal yvirtakast í hesum valskeiðnum, kemur ongan veg. Handalagið tykist vera sera vánaligt, og kann hetta geva ein illgruna um, at har, sum yngra ættarliðið í Tjóðveldisflokkinum sleppur framat, endar alt í rok og klandri, uttan at stórvegis ítøkiligt kemur burturúr. Man hevur kappað á stokkinum við allar teir gomlu, sum sótu við nógvum royndum m.a. um konsensus og at loysa stórmál í breiðum semjum.

Fólkakirkjan kundi verið yvirtikin av andstøðuni við nógv betur handalagi, enn samgongan megnar. Tað er klárt, at ein yvirtikin kirkja má vera í sama líki sum nú, har statsins partur fer á fíggjarlógina. Um man bíðar eftir, at politikarar, fríkirkjufólk og prestar semjast, so verður kirkjan ikki yvirtikin í okkara tíð, tí hesir bólkar semjast ongantíð. Tá tað er sagt, so skulu sjálvandi bispur og prestar takast uppá ráð viðvíkjandi tí reint praktiska viðvíkjandi einari yvirtøku.

Flestu yvirtøkur og framstig annars á sjálvstýrisleið í Føroyum eru hend undir javnaðarleiðslu. Hetta er eitt søguligt faktum, ið sjálvt Torbjørn Jacobsen má fyrihalda seg til. Alternativið til núverandi heimstýrissamgongu við fáum yvirtøkum við vánaligum handalagi og einari fíggjarlóg við borgarligari slagsíðu, er ein samgonga við fleiri yvirtøkum við betri handalagi og einari solidariskari fíggjarlóg. Vit eru jú øll, inklusiv Tjóðveldisflokkurin, samd um at vera innanfyri Ríkisfelagsskapin tey næstu árini – ella hvussu?

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Er du blevet røg-forgiftet Marianne Telling?

Petur Dahl Nolsøe
Vágur

Nei, onki er tað, tað deiliga menniskja Marianne Telling, prestur í Vági, ið ikki tolir tann føroyska dieselroykin, at hon heldur vil fara til royk-osan í Kjøpenhavn… tí tað liggur jú nakað heilt annað aftanfyri, og tað er tað, at hon er gift við einum fanatikara og Bach-virtuosi, Claus Telling – ið ikki tolir royk – sum er eitt geni – innan tónleik – og tíverri – bara tað.

Originalur, má sigast. – Tíverri altso, vit hava jú brúk fyri sovornum talentum, serliga í Suðuroy, og Stóra Pakkhús, sum hevur eitt flunkandi nýtt flygel (klaver) av flottasta slag, var, ella er hann spesialistur at tangentera uppá, og hevur fingið bæði Brand og Trónd Enni, og fleiri aðrar topp musikkarar (m.a. Edv. N. Debes) og sangarar lokkandi til hetta flotta flyglið, ja tað er bara spell, at man missir slík talentir. – Men, men – tá eg hoyrdi at Claus Telling hevði bjóðað Sumbiar kirkju tað gamla orglið frá 1872, ið stóð í olmussu-kirkjuni á Kirkjuketti í Vági, (tann kirkjan stendur nú í Hovi, har hovbingar taka sær væl av henni), tí orglið í Sumbiar kirkju var falskt – tann eina dagin hann varð biðin um at spæla har suðuri, tá hvakk eg við.

Søgan um tað gamla orglið, sum kom heim til Vágs við einum kornskipi, er víða kend og nógv skrivað um í ymsum bókum – er loksins blivið restaureað fyri nógvar pengar – og tað biður Claus Telling bara sumbingar fara avstað við, »for det står der til ingen nytte«.

Nei, gott er Claus, hav tað gott í royk-osanum í Kjøpenhavn og Marianna, takk fyri tíðina tú var her, og blíðan byr framyvir, – tú kom tó at læra føroyskt hetta eina árið, vælgagnist.

Hvat bleiv av útjaðara- og økismenningarvisiónum samgongunnar?

Johan Dahl
Løgtingsmaður

Tað er sera ringt at fáa eygað á økisø og útjaðaramenningar politikkinum hjá samgonguni, hann er nærri at kalla ein miðvísur avoyðingarpolitikkur.

Hyggja vit at økismenningini, so kann ein spyrja seg, hvar hon bleiv av??

Tað blivu í seinasta valskeiði gjørd bæði økismenningarálit og útoyggjaálit, sum nærmast skuldu verða við til at "revulotinerað" hesi økið, so meira liviligt skuldi blíva, eins og virksemið á hesum økjum skuldi hava somu karmar sum meginøki(ni).

Fíggjarlógin og tær skerjingar á fiskivinnumenning landi og flutningsstuðlinum, gransking o. a eru dømir har ein fer 1 fet fram og 2 aftur og kann ein spyrja, hví tit ikki kannað konsekvensin fyri vinnuna og økini áðrenn tit skerja.

Vit hoyrdu í dag í útvarpinum hvussu t.d. ein avtøka av stuðlinum fyri eykatollin av framleiðslu úr russarafiski hjá Fiskavirking, sum faktisk er ein inntøkuskapandi fyri landið tá gjørt verður upp, beinleiðis kemur at oyðileggja eina framleiðslu har ein nichemarknaður er skaptur og sum hevur virkað væl, og givið pening av sær bæði til land og virkið. Skil tað hvør í kann, hvussu hesi sum skert hava roknað hatta úr?

Taka vit samferðsluøkið og ferðaseðlaprísirnar og farmakostnaðin sum nú er ætlan at hækkað við 15%, so er hetta eit stig sum allir útjaðaraløgtingslimir áttu at sett seg harliga upp imóti, tí tað kann ikki verða rætt suðringar nú skulu ca. 80 kr. fyri persón og ca. 140 kr. fyri persónbil einvegis um suðriarfjør.

Skal farmaflutningur eisini økjast við 15% har strandferðslan longu framman undan er eftirbátur so tað forslær við prísum og als ikki er kappingarfør, í mun til lastvognsog trailaraflutning hjá privatum, so verður tað vinnan, sum verður taparin aftur her og má málið so endaliga verða at allur flutningur av t.d. fiski til útlandið slettis ikki longur fer um Havnina men beinleiðis úr suðri til meginlandið.

Tað er neyðugt, at tað politiskt verður sett hol á eina "nýggja leið" hvat viðvíkur gjøldum gjøgnum tunnlar og har firðir og sund skilja.

Vit mugu hava somu kor og kostnaðir, óansað um tú kemur við ferju og bili úr Klaksvík ella úr Suðri til Havnar ella um tú kemur úr Svíni , Mykinesi ella Hesti til Havnar.

Tað er neyðugt at hesin trupulleiki verður tikin upp skjótast tilber.

Um vit t.d. taka ein fuglfirðing, sum koyrir við bussi til Havnar til arbeiðis aftur og fram so fær hesin faktisk beinleiðis stuðul frá tí almenna fyri at koma til og frá arbeiði, hetta tí at mánaðarkortið kostar ca. 600 kr. - meðan flutningsendurgjaldið fyri teinin pr. mánad verður uml. 800 krónur .

Hesin kann við ørðum orðum fáa ein ókeypis ferðaseðil til Danmarkar pr. ár - tí hann nýtir bussin.

So ójavnt er býtt.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hálvrunnin býráðsseta – hvat er útint?

Vegna býráðið á Tvøroyri
Finnleif Guttesen, borgarstjóri

Nú verandi býráðssetan er hálvrunnin, fari eg í høvuðsheitum at vísa á, hvussu stendur til, hvussu gongst og hvørji fíggjarligi útlitini eru. Harafturat vil eg royna at geva borgarunum í Tvøroyrar Kommunu eina mynd av hvar kommunuskattakrónurnar fara, og hvat vit hava í hyggju í hesum ári.

Skattur
Grundleggjandi kunnu vit fegnast yvir, at skattainntøkan bæði seinastu árini er økt, og útlit eru fyri, at hon fer at økjast nakað aftur í ár. Fíggjarætlanin fyri 2001 var uppá 40.027.000 kr., fyri 2002 er hon 42.645.000 kr. og fyri 2003 er fíggjarætlanin kr. 43.902.000.

Lán:
Við tryggari skattainntøkum ber eisini til at minka um skuldina, og tað hevur eisini eydnast.

Við árslok 2000 var skuldin 113 mill., við árslok 2001 var hon 103 mill. og við árslok 2002 er skuldin 93 mill. krónur. Avdráttir eru umleið 9,7 mill., og rentuútreiðslur smáar 5 mill.

Tá lániavtalan, sum kommunan er bundin av, er úti við árslok 2005, er skuldin komin niður á umleið 64 mill krónur. Við øðrum orðum fer at bera til at lækka skuldina úr trimum skattaálíkningum og niður móti einari eftir fimm árum.

ÍLØGUR
Málið er, at allir borgarar eins og vinnuvirkir í kommununi skulu hava sóttreinsa vatn, og tí er neyðugt við einari støðugari útbygging av vatngoymslum. Nýggjur brunnur er tikin í brúk, og nýggj leiðing er løgd út til Drelnes.

Í 2003 er ætlanin at leggja rør frá vatnverkinum til samlibrunnar í Mannagjógvsá og Hvannagjógvsá.

Íløgur eru eisini gjørdar í Tvøroyrar Havn. Útfylt er við Delta og eystanfyri flakavirkið, og somuleiðis er ein skitsuætlan gjørd av einum nýggjum keikanti uttanfyri flakavirkið.

Í 2003 er ætlanin framhaldandi at útfylla á havnaøkinum. Grót fæst við at spreingja í grótbrotinum omanfyri kirkjugarðin, og hervið verða parkeringsmøguleikarnir eisini betri.

Økið eystanfyri kirkjugarðin er keypt til framhald av verandi kirkjugarði, sum skal víðkast í ár.

RAKSTUR
Skúlaøkið:
Seinastu árini hava skúlarnir støðugt verið viðlíkahildnir. Takið á gamla skúla er skift, og somuleiðis er arbeiðið at skifta takið á ítróttarhøllini og skúlanum í Trongisvági um at verða liðugt. Ymiskt viðlíkahald er eisini gjørt inni í skúlunum, men enn restar nógv í fyri at fáa gamla skúlan upp á eitt hóskandi støði, men hetta arbeiði heldur fram.

Tvøroyrar havn
Landingarøkið við flakavirkið er asfalterað, og somuleiðis er alt økið frá gestastovuni til uttara bátahyl nú eisini asfalterað.

Ljóssteyrar og autoverja, sum vóru á keiøkinum, eru tikin niður, og ein ljósmastur sett upp ístaðin. Hetta lættir nógv um koyringina við bingjum og trailarum

Bátahyljar og ídnaðarøki
Í bátahyljunum í Trongisvági eru nýggj el-skáp uppsett. Norðari innsiglingararmur skal umvælast, og ætlanin er, at økið eystan fyri hylin skal ruddast og planerast meira.

Í uttara bátahyli skal felagsdrátturin umvælast. Básar eru avmerktir á økinum, og skulu hesir kunna leigast av áhugaðum. Brúgvin á Hvítanesi, sum er ein av teimun seinastu træbrúgvunum í landinum, verður umvæld.

Eitt stórt øki í gamla grótbrotinum er rudda, men enn er eingin avgerð tikin um hvat økið skal brúkast til.

Vegir, kloakkir og renovatión
Nýggi vegur og vegastrekkið í Mýrudali er asfalterað.

Gongubreytin á ovara síðu á nýggja vegi verður liðugtgjørd, og somuleiðis verður gjørt klárt til gøtuljós, telefon og vatn.

Nógv asfaltarbeiði dregur út, tí kommunan vil hava kloakk- og vatnviðurskiftini í lagi áðrenn asfalterað verður av nýggjum. Hetta er fíggjarliga krevjandi arbeiði, og verður tí ikki møguleiki at umvæla tær stóru vegalongdirnar og kloakkir í senn.

Nøgdirnar av ruski bert vaksa. Hetta kostar nú kommununi meira enn 3 mill. kr. um árið. Ein bingja til papp er sett á bingjuplássið fyri at fáa meira skiljing, og ein kvørn er keypt til trø og runnar.

Almanna- og heilsumál:
Á barnaansingarøkinum eru eingin bíðilisti. Frítíðarskúlin hevur pláss til 20 børn.

Tannlækni er til barnatannarøkt burturav, og somuleiðis eru gomlu tannlæknahúsini sett í stand, har nýggjur tannlækni hevur leigað seg innar.

Peningur er settur av til eldrasambýli.

Ymiskt:
Bygningurin hjá kommunalu umsitingini er keyptur frá Føroya Banka.

Svimjihylurin hevur fingið nýggja ventilatión.

Viðalundin verðurhampað.

Sjálvandi er eitt og annað, sum ikki kemur við í hesa stuttu frágreiðing, men er tað okkara vón, at borgarin við hesum hevur fingið eitt innlit í tað, sum býráðið arbeiðir við.

Trygg á sjónum

15. november í ár skipaði Føroya Sjómansskúli fyri einum temadegi um trygd á sjónum. Undirtøkan var góð, og uml. 100 fólk vóru møtt

TÍÐINDASKRIV

Fyrilestrar:
Daniel J. Poulsen, stjóri á Føroya Sjómansskúla, legði fyri og bjóðaði vælkomin. Hann greiddi frá undirvísingini á skúlanum, sum í nógv størstan mun snýr seg um trygd á sjónum. Eisini kom hann inn á, at herd trygdar- og tilbúgvingarkrøv í fyrstu atløgu tykjast at kosta, men í longdini vinna vit tað inn aftur í færri vanlagnum.

Anfinn Kallsberg, løgmaður segði, at trygd á sjónum hevði eina høga politiska raðfesting. Málið er, at føroysk skip skulu vera tey tryggastu í heiminum. Men her krevst samstundis eisini ein hugburðsbroyting í fiski- og sjóvinnuni.

Politiskt verður í løtuni arbeitt við at fáa atstøðulimaskap (assosieraðan limaskap) í altjóða sjóvinnufelagskapinum undir ST, sum eitur IMO.

Skipaeftirlitið er yvirtikið, og verður nú arbeitt við at tillaga trygdarkrøvini til føroysk viðurskifti og at røkka endamálinum.

Óli Hans H. Olsen, stjóri á skipaeftirlitinum, kom í sínum innleggi serliga inn á arbeiðsumhvørvi umborð á skipunum. Hann nam við øki sum inniklima, arbeiðsklæðir, kost, larm og ikki minst dekshæddir.

Hann mintist frá tí, hann sjálvur fór til skips fyrstu ferð, hvussu útslitnir miðaldrandi menn kundu vera av vánaligum arbeiðsumhvørvi umborð. Eisini hann kom inn á hugburðsbroytingar í hesum sambandi.

Lassi Borðoy og Ingrid Holm, lærarar og skeiðshaldarar á Føroya Sjómansskúla, tosaðu ávikavist um arbeiðsumhvørvi og medisinkistuna í útbúgvingarhøpi. Víst varð á, at eitt nú í Danmark eru krøv um eftirútbúgving fyri sjómenn, tá tað snýr seg um arbeiðsumhvørvi og heilsu. Serliga eru tað yvirmenninir, sum fáa eftirútbúgving innan nevndu øki.

Don Petersen, samskipari á Fjarskiftiseftirlitinum, kom í sínum fyrilestri inn á samskifti, sum er ein týðandi partur av tilbúgvingarog trygdarskipanini til havs. Serliga varð nomið við ta sonevndu GMDSS-skipanina, INMARSAT- og C O S P A S / S A R S A T-samskiftisfylgissveinarnar, sum eru ein avgerandi partur av alheims tilbúgvingar- og trygdarskipanini til havs. Komið var inn á ta nýggju AIS skipanina - ein skipan, sum ger tað møguligt at fylgja við, hvar skipið er. Hann kom í hesum sambandi eisini inn á nakað nýtt, sum kemur at henda innan altjóða skipaferðslu, serliga áftaná yvirgangsatsóknina á World Trade Center. Hetta snúði seg um eina altjóða lóg um, hvussu skipast skal fyri í samband við yvirgangsatsóknir innan skipaferðsluna. Øll skip skulu framyvir hava ein sokallaðan "security offícer" og ein yvirgangsneyðknøtt umborð, umframt at allar góðkendar havnir á altjóða stigi skulu hava eina góðkenda "security" skipan.

Eisini varð nomið við arbeiðsøkið hjá Fjarskiftiseftirlitinum, og víst varð til heimasíðu Fjarskiftiseftirlitsins viðvíkjandi VHF-útbreiðsluni í Føroyum hjá skipaferðslini.

At enda greiddu Sjúrður Guðjónsson, skeiðsleiðari og Christian Poulsen, skeiðshaldari, frá ávikavist skeiðsdeild skúlans og um hvørji tól, skúlin ræður yvir til undirvísingarbrúk.

Nakrir fyrilestrar eru lagdir út á heimasíðu skúlans: www.farnav.fo

Kjak:
At enda var kjak á skránni. Kjakið var lívligt, og vísti tað seg, at evni - trygd á sjónum - er eitt evni, sum upptekur bæði okkara sjófólk og fólk flest.

Evnini vóru, sum væntað, nógv á skránni. Her skulu nøkur evnir, sum vit uttan iva fara at hoyra meira um í framtíðini, takast fram:

1. Arbeiðsumhvørvi:
   Larmur
   Inniklima
   Arbeiðsklæðir
   Kostur
   Dekshæddir
2. Samskifti:
   VHF-sendinetið má gerast betri.
   GMDSS støðir mugu hava venjingarsimulator.
   GMDSS støðir og NAVTEX mugu innstillast rætt.
3. Smábátar:
   Hvussu er eftirlitið við trygdini umborð á smábátum?
4. Eftirlit:
   Fylgisveinaskipanir koma umborð á øll skip.
5. Mynstringslistin:
   Tekin eru um, at neyðugt er at broyta hann, tí hann er ótíðarhóskandi.
   Skal yvirlit yvir kravd sertifikat standa á listanum.
   A4 stødd.
   Mynstringareftirlit.
   Neyðugt er við nýggjum uppskotum.
6. Verksetan av hugburðsbroytingum:
   Ábyrgdin hjá skiparanum er stór. Teir hava skyldu at kanna,
   at øll viðurskifti í samband við tilbúgving og trygd eru í lagi.
   Royna at fáa sjómannakonur við í arbeiðið tá tað snýr seg um arbeiðsumhvørvið umborð á skipum.

Samstundis sum arbeitt verður við at betra um trygdina á sjónum, má alla tíðina hugsast um kostnaðin á teimum tiltøkum, ið verða sett í gildi.

Men aðalmálið er, at føroysk skip skulu vera tey tryggastu í heiminum.

Føroya Sjómansskúli og skipaeftirlitið takka fyri góða uppmøting. Tiltakið gav okkum mót at halda á við líknandi tiltøkum í framtíðini. Fyribils er ætlanin at skipa fyri líknandi fundi næsta heyst.